## TIL ARBEIÐIS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Vilmund Jacobsen, vilmund@sosialurin.fo




### FAKTA:

**Navn:** Brandur Leivsson Hansen
**Aldur:** 22 ár
**Besta við starvinum:**
At møta ymiskum fólki
**Ringasta við starvinum:**
Mær dámar tað bara...
**Staður:** Vágsbotnur
**Stjóri:** Jóhannes Jensen

*Síðan hann var 18-19 ára gamal hevur Brandur Leivsson Hansen hjálpt til í frítíðini á Hotel Føroyum, og hetta er annað árið, at hann arbeiðir í Kafe Vágsbotn*

**MYND:** VILMUND JACOBSEN

# Lesur stjórnmálafrøði **og selir sushi í Vágsbotni**

**SEINNAPARTIN** MIKUDAGIN LÆT **KAFE VÁGBOTN** UPPAFTUR OG **FER** NÚ AT HAVA **OPIÐ** TIL ENDAN AV AUGUST. Í GJÁR, TÁ **SOSIALURIN** VITJAÐI, STÓÐ 22 ÁRA GAMLI, **BRANDUR LEIVSSON HANSEN**, Í ÚTIKAFE'INI

Brandur er hoyvíkingur, og hann lesur stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetri Føroya. Hann gjørdist málsligur studentur í Hoydølum í 2009 og byrjaði at lesa á Setrinum síðsta heyst.

Seinnu árini hevur hann arbeitt fyri Hotel Føroyar í frítíðini, og her hevur hann eitt nú staðið í barrini, eins og hann hevur tikið sær av ymiskum urtagarðs-og viðlíkahaldsarbeiði.

Hann hevur ikki fast starv hjá Hotel Føroyum, men er til reiðar, tá ringt verður eftir honum. Hetta hevur serliga verið eftir skúlatíð, í vikuskiftunum, og tá jólafrokostir og onnur størri tiltøk hava verið.

Nú verður tað í Kafe Vágsbotn fram til heystar.

### Kafe Vágsbotn

Í fjør summar arbeiddi Brandur eisini í Kafe Vágsbotn, og hetta dámdi honum ógvuliga væl. Nú kafe'in læt uppaftur seinnapartin mikudagin, er hann enn einaferð til reiðar at taka sær av viðskiftafólkum, sum detta inn á »gólvið« í útikafeini – til ein bita ella til okkurt leskandi.

– Vanliga hava vit opið frá klokkan 11 fyrrapart til klokkan 22 á kvøldi. Er veðrið gott, og nógv fólk er í Vágsbotni, kunnu vit hava longri opið. Vit hava eitt nú sandwick, høsnarunga, sushi og vaflur, og vit hava eisini sodavatn, smooties, milkshake, øl og sommersby, sigur hann.

### Væl vitjað

Brandur Leivsson Hansen sigur, at Kafe Vágsbotn verður væl vitjað, tá veðrið er gott.

– Tað hevur eisini víst seg, at rættiliga nógv fólk savnast í Vágsbotni, tá ferðamannaskip eru á Havnini. Hinvegin eru flestu gestirnir hjá okkum føroyingar, og sum heild hava fólk tikið væl ímóti útikafe'ini í Vágsbotni, leggur hann aftrat.

Hann vísir á, at í fjør høvdu tey eisini stórskíggja, har fólk, sum vitjaðu, eitt nú høvdu høvi at síggja HM-fótbólti úr Suðurafrika.

– Eg vænti, at vit fara at seta sjónvarp uppaftur í ár, har fólk kunnu síggja sendingar frá eitt nú Oyggjaleikum og ymiskum øðrum kappingum úti í heimi – og kanska verður eisini víst frá onkrum av føroysku summarstevnunum, leggur Brandur aftrat.

Men er tað ikki kalt at arbeiða í eini útikafe?

– Nei, tað er eingin trupulleiki við kulda. Vit hava jú rúmið her aftanfyri, og vit hava eisini røttu búnarnar, tá sólin ikki skínur.

Brandur Leivsson Hansen heldur, at tað er sera hugnaligt at arbeiða í Vágsbotni um summarið, tá sólin skínur, og øll eru í góðum hýri.

### Hevur fjakkað

Ungi hoyvíkingurin sigur, at stjórnmálafrøði kann lesast fram til endan av útbúgvingini í Føroyum, men hann væntar, at hann fer at taka okkurt semestur í onkrum øðrum landi.

– Hetta verður neyvan í Danmark, men helst í onkrum enskt talandi landi, leggur hann aftrat.

Brandur sigur, at um hesa tíðina í fjør vóru hann og ein vinmaður og fjakkaðu í fjareystri.

– Vit vóru burtur í tríggjar mánaðir, og hetta var ein fantastisk tíð, har vit upplivdu onnur lond, onnur fólk og aðrar mentanir. Vit sóu, hvussu fólk liva, og hvussu tey hava tað í gerandisdegnum, har tey búgva og liva sítt lív, sigur 22 ára gamli hoyvíkingurin, Brandur Leivsson Hansen.